# Hugnaligar heimasíður

*Lag til rættis: Rigmor Dam*

Har DalleValle katalogini sleptu, hevur internetið tikið yvir. Nú veturin veruliga hevur tikið yvir, er tað herligt at kunna sita heima í hitanum og shoppa púra ómakaleyst meðan Visakortið stendur sína roynd. Ella bara at surfa runt og fáa hugskot, finna fram upplýsingar ella lesa nakrar góðar greinar



## Til tey heimligu

*www.zalt.fo/*
Keyp jólagávuna á netinum. Føroysk heimasíða við gávulutum av alskyns slag. Gávurnar verður pakkaðar inn, og antin koyrdar ella sendar til hús innan fáar dagar.



## Til tey smørtu

*europe.zoovillage.com*
Skandinavisk heimasíða við mótaklæðum. Óendaliga nógv cool merki.



## Til tey gávumildu

*http://www.aura4laura.dk/*
Túsundavís av lekrum gávum til hennara, hansara, børnini og til heimið.



## Til tey freku

*www.sexhistorier.dk*
Síða við erotiskum søgum – bæði vanligar og sera frekar. Nakrir av bólkunum krevja limaskap, meðan aðrir eru ókeypis. Hvør sín tørv:-)



## Til tey perfektu

*www.realsimple.com/*
Undirheitið á heimasíðuni Real Simle er "Life made easier". Síðan til ta perfektu amerikansku (ella føroysku) húsmóðrina. Lærir teg, hvussu lívið verður væl og virðiliga lagt til rættis, so alt verður púra perfekt.




## Til tey tilvitaðu

*www.forbrugerraadet.dk/*
Góð ráð til gerandisdagin, upplýsingar um brúkaravernd, nógv leinki og áhugaverdar greinar.